HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

19. oktober 2018
Mál: 18/00777-11
Tygara skriv:
Viðgjørt: Katrin Gaard

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum sjúkum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 126 frá 2. desember 2015 um ókeypis koppseting ímóti ávísum sjúkum, verður gjørd hendan broyting:

**1.** Aftan á § 3 verður sum § 3a sett:

"*MFR-koppseting til ung vaksin*

**§ 3a.** Persónar, ið hava fylt 18 ár, sum eru føddir í 1974 ella seinni, og sum ikki hava havt meslingar, og ikki eru koppsettir ímóti meslingum, kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti meslingum. Koppsetingin verður veitt sum ein MFR-koppseting."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo